Nordic Sustainable Construction

# Læraravegleiðing: 3.4.1 Hví endurnýta múrsteinar?

**Tema**

- Endurnýtsla
- Umhvørvisávirkan
- Rávørunýtsla
- Samanbering millum endurnýtslu og nýtt tilfar

**Mælt tíðarskeið**

80 min.



## Tigul

Undirvísingartilfartil skeið um endurnýtsluav tigulsteinum í bygging

## Innleiðsla

Við einum sjónbandið og einari grein verður lærlingurin kunnaður um fakta, sum viðvíkja hvussu endurnýtsla av múrsteinum avmarkar broytingar í veðurlagnum og sparir á tilfeingi. Eitt arbeiðsark við spurningum gevur lærlinginum møguleikan at arbeiða við evnum, sum eru neyðug fyri at náa lærumálunum. Eftir at hava loyst uppgávuna, verður vitanin deild í flokkinum undir leiðslu av læraranum.

## Fyrireiking

Áðrenn undirvísingina skal lærarin:

- Kanna tjóðskaparligu krøvini til hvørjar modulir skulu verða við í eini LCA-klimatútrokning.
- Orientera seg við dømunum á EPD (sí heimasíðuna).
- Kanna svarini til spurningarnar í uppgávuni.

## Læringamál

- Lærlingurin kann yvirskipað meta um munin í umhvørvisávirkanina millum endurnýttir og nýggir múrsteinar (H2).
- Lærlingurin kann lýsa fyrimunirnar við at velja endurnýtt tilfar við atliti at rávørunýtslu og umhvørvisávikanin (V2).
- Lærlingurin kann grundgeva fyri fyrimunirnar við nýtslu av ávísum tilfari við atliti at endurnýtslu, rávørunýtslu og umhvørvisávirkanum (H2).

## Innihald og endamál

Luttakarin skal við hesum tilfari arbeiða við sparingunum, sum kunnu gerast á umhvørvisávikanina og rávørunýtsluni við at nýta endurnýttar múrsteinar.

- Sjónband
- Grein við dýping av evninum

# Læraravegleiðing: 3.4.1 Hví endurnýta múrstein?

- Spurningar, sum tryggja at lærlingurin dekkar innihaldið tengt til lærumálini. Uppgávuarkið inniheldur uppgávur, sum lýsa CO2-sparingina við at nýta endurnýttar múrsteinar og aðrar umhvørvisligar fyrimunir við at nýta endurnýttar múrsteinar.
- Vitanardeiling í flokkinum, har lærlingurin leggur svarini á loystu uppgávunum fram og fær møguleikan at úttala seg í felagsskapi flokksins. Í hesum sambandi gevur lærarin afturmeldingar til svarini. Aðrir luttakarar úr flokkinum kunnu leggja aftrat við sjónarmiðum.

## Uppskot til undirvísingarætlan

<u>Innleiðsla – 5 min</u>

- Lærarin leggur tilfarið fram og setir lærlingin í gongd.

<u>Sjónband – 5 min</u>

- Lærlingurin hyggur at sjónbandinum.

<u>Grein - 10-15 min</u>

- Lærlingurin lesur greinina

<u>Svara uppgávum– 35 min</u>

- Lærlingurin svarar spurningunum í bólkum.

<u>Vitanardeiling í flokkinum – 20 min</u>

- Lærlingurin deilir vitanina í flokkinum.

## Sundurgreining

Førleikin hjá luttakaranum at uppfata og siga innihaldið í sjónbandinum gevur møguleika at veita meira ella minni framkomin íkast til vitanardeilingina. Við hvørt íkast fær luttakarin beinleiðis afturmelding frá læraranum, tí lærarin hjálpir til at greiða grundgevingarnar áðrenn íkastið verður skrivað á tavluna. Luttakarin fer at uppliva, at "góð" íkast verða viðurkent og skrivað beinleiðis á tavluna, meðan ógreið/skeiv íkast verða tillutað/endurtulkað í samstarvi millum læraran og luttakaran, áðrenn tey verða skrivað á tavluna.

## Afturmelding og meting

Lærarin hevur møguleika at veita afturmelding meðan uppgávan verður loyst, har lærarin tekur ein ráðgevandi leiklut. Haraftrat kann lærarin veita afturmelding undir samanfatanini, har lærlingurin deilir vitanina við flokkin.